# VEÐURLAGSPOLITIKKUR FØROYA 2020-2030

Heilsu- og innlendismálaráðið

2019

**HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ**

Veðurlagspolitikkur Føroya 2020-2030
© Heilsu- og innlendismálaráðið 2019
Sniðgeving, umbróting og prent: Føroyaprent
ISBN 978-99918-3-612-6

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

# Innihald

Fororð ..... 5

Samandráttur ..... 6

Inngangur ..... 7

1. Støðan í dag ..... 10

2. Karmurin um veðurlagspolitikkin næstu 10 árini ..... 14

3. Veðurlagsmálini fyri Føroyar fram til 2030 ..... 18
3.1 Á landi ..... 18
3.2 Skip ..... 19

4. Tilmæli ..... 22
4.1 Átaksøki ..... 22
4.2. Seta fastari karmar um veðurlagspolitikkin ..... 22
4.3 Minka oljunýtsluna til upphiting ..... 23
4.4 Minka oljunýtsluna til ferðslu ..... 24
4.5 Øll elframleiðsla skal verða úr varandi orkukeldum ..... 24
4.6 Minka oljunýtsluna til vinnu á landi ..... 25
4.7 Minka oljunýtsluna hjá skipum og flogførum ..... 25
4.8 Upplýsing og gransking ..... 26
4.9 Avgjald á olju og bensin ..... 27

Fylgiskjal 1 - Nøkur fíggjarviðurskifti ..... 30

Fylgiskjal 2 - Ávirkan av átøkum ..... 32

# Fororð

Hetta uppskotið til veðurlagspolitikk Føroya fram til 2030 er úrslit av arbeiði, sum landsstýriskvinnan í Heilsu- og innlendismálum, Sirið Stenberg, hevur sett í verk.

Í arbeiðssetninginum er ásett:

“Endamálið við verkætlanini er at framleiða uppskot til endurskoðaðan Veðurlagspolitikk fyri Føroyar. Uppskotið skal verða grundarlag fyri politiskari samtykt um, hvørji mál Føroyar seta sær viðvíkjandi útlátinum av vakstrarhúsgassum fram til 2030. Hesi mál, og hvørji tiltøk ætlanin er at seta í verk til tess at røkka málunum, skulu fráboðast innan 2020. Arbeiðið kann býtast í tveir partar:

1. Fáa til vega eitt fakliga grundað uppskot til veðurlagspolitikk. Uppskotið skal fevna um eitt realistiskt og framsøkið boð upp á, hvussu nógv Føroyar kunnu skerja útlátið av vakstarhúsgassum fram til 2030, og hvørji átøk eru neyðug, til tess at røkka hesum.

2. Ein politisk viðgerð av fakliga tilmælinum. Ein møguleiki er – eins og í 2009 – at allir flokkar á Løgtingi leggja fram eitt uppskot til samtyktar um at skerja útlátið av vakstrarhúsgassum fram til 2030 við ávísum prosenttali.

Uppgávan er tí fyrst og fremst at fáa til vega eitt fakligt grundarlag til politisku skipanina at taka støðu til. Tað merkir at málini, ið sett verða, mugu vera realistisk og hava hald í veruleikanum. Samstundis mugu tey vera framsøkin, tí støðan er álvarslig, og skulu vit takast í álvara í altjóða samfelagnum, mugu vit seta okkum fyri at skerja útlátið munandi.

Endurskoðaði veðurlagspolitikkurin skal somuleiðis innihalda ítøkilig tilmælir um miðvís átøk, sum eru neyðug at fremja til tess at røkka settu málum. Av tí, at oljunýtslan er orsøk til bróðurpartin av útlátinum av vakstrarhúsgassum (91 prosent), so er orkupolitikkurin krummtappurin í veðurlagspolitikkinum. Í samtykta veðurlagspolitikkinum frá 2009 eru boð uppá onnur átøk á øðrum økjum. Givið er, at hesi verða ein týðandi partur í arbeiðinum við at endurskoða politikkin.”

Tvær høvuðsorsøkir eru til, at Føroyar skulu hava nýggjan veðurlagspolitikk. Fyrsta orsøkin er, at verandi veðurlagspolitikkur gongur fram til 2020, og hesin skal tískil endurskoðast. Eisini hava Føroyar tikið undir við Parísavtaluni, sum fær gildi í 2020. Tann avtalan leggur støðið undir, hvussu nógv Føroyar skulu skerja sítt útlát av vakstrarhúsgassi.

Komandi veðurlagspolitikkur er annar í røðini, og aðalmálið er framvegis at gera Føroyar minni tengdar at olju og øðrum fossilum brennievnum og at økja gagnnýtsluna av varandi orkuni. Málini fram til 2030 skulu sostatt skiljast sum ein partur av eini størri og drúgvari tilgongd. Heimsins lond stremba eftir, at einki nettoútlát av vakstrarhúsgassi verður í 2050, og í Føroyum skal eisini áhaldandi stýrast eftir hesum málinum.

Í verkætlanarbólkinum, sum hevur skrivað uppskotið, hava verið:

Petur Joensen, ráðgevi,
Heilsu- og innlendismálaráðið, formaður.

Ingibjørg Thomsen, samskipari, Fiskimálaráðið.

Suni Petersen, deildarleiðari, Umhvørvisstovan.

Tórir Michelsen, fulltrúi, Fíggjarmálaráðið.

Uni Holm Johannesen, fulltrúi,
Uttanríkis- og vinnumálaráðið.

Fróði Jacobsen, samskipari, Heilsu- og
Innlendismálaráðið (í bólkinum inntil mai 2019).

Í stýrisbólkinum hava verið aðalstjórarnir frá Heilsu- og innlendismálaráðnum, Fíggjarmálaráðnum, Fiskimálaráðnum og Uttanríkis- og vinnumálaráðnum. Í tilgongdini hevur uppskotið verið til viðmerkingar hjá stovnum og felagsskapum, herundir politisku ungmannafeløgunum.

Við hesum er uppskot til veðurlagspolitikk Føroya fram til 2030 latið landsstýriskvinnuni.

Tórshavn, hin 20. juni 2019

Heilsu- og innlendismálaráðið
Turid Arge, aðalstjóri
formaður

Fíggjarmálaráðið
Bjarni Askham Bjarnason, aðalstjóri

Fiskimálaráðið
Rógvi Reinert, aðalstjóri

Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Herálvur Joensen, aðalstjóri

# Samandráttur

Í hesum uppskotinum verður mælt til fleiri átøk at skunda undir orkuskiftið í Føroyum. Uppskotið tekur sum heild støði í teimum tilmælum og málum, sum veðurlagsnevndin hjá ST, Intergovernmental Panel on Climate Change, IPCC, hevur sett fyri at skerja samlaða heimsútlátið av vakstrarhúsgassi við 45 prosentum í 2030. IPCC mælir eisini staðiliga til, at heimsins lond ikki hava meira útlát í 2050 enn trø, plantur og hav kunnu upptaka. Skotbráið er lutvíst stutt og fyri at røkka hesum, er neyðugt við greiðum átøkum beinanvegin. Tað er við hesum tilmælum í huga, at hetta uppskotið skal lesast.

Høvuðsmálið í veðurlagspolitikkinum fram til 2030 er sett í tveimum. Í fyrsta lagi verður mælt til, at Føroyar skerja sítt útlát av vakstrarhúsgassi á landi við í minsta lagi 45 prosentum fram til 2030 í mun til útlátið í 2010. Í øðrum lagi verður mælt til, at Føroyar beinanvegin fara at seta tiltøk í verk fyri at tálma útlátið frá skipum, soleiðis at útlátið á sjónum skal vera skert 50 prosent í 2050, sum altjóða sjóferðslufelagsskapurin hjá ST International Maritime Organisation, IMO, mælir til.

Skerjingin fram til 2030 verður eftir hesum uppskoti sostatt minni, enn IPCC mælir til. Orsøkin er heilt einfalt, at skulu Føroyar skerja sítt útlát 45 prosent, vil tað í praksis siga, at vit skulu gevast við mest sum allari oljunýtslu á landi longu í 2030. Tað verður ikki hildið at vera realistiskt.

Tað verður mett skilabest, at orkunýtslan á landi og orkunýtslan hjá skipum verða viðgjørd hvør sær í veðurlagspolitikkinum, tí viðurskiftini á landi og sjógvi kunnu illa sammetast. Sum støðan er nú, eru møguleikarnir at minka oljunýtsluna frá skipum avmarkaðir, men hetta sigur kortini ikki, at skip ikki eisini skulu taka tøk.

Átøkini, ið verða skotin upp, fevna víða. Tað eru millum annað stuðulsskipanir, avgjøld og krøv, sum skulu ásetast við lóg. Mælt verður til, at uppskotini, sum politisk undirtøka er fyri at seta í verk, verða nágreinað, herundir at mett verður um tørvin á, at samfelagsbúskaparlig lýsing verður gjørd av ætlaða orkuskiftinum. Hetta kann vera viðkomandi til tess at meta um, hvussu átøkini verða sett í verk á mest skynsamiligan hátt, og hvussu tey skulu raðfestast

Altjóða granskingarumhvørvi hava skundað undir tilgongdina at finna loysnir innan reinorku umskiftið. Roknað verður við, at tøknin á økinum fer at mennast skjótt næstu árini. Av somu orsøk er neyðugt áhaldandi at fylgja tøkniligu gongdini neyvt og gera tillagingar í átøkunum, har tað krevst. Tað er kortini neyvan sannlíkt, at tøkniliga broytingin fer fram so skjótt og av sær sjálvari, at Føroyar sum samfelag sleppa undan at taka ítøkilig stig beinanvegin. Tað er sera týdningarmikið, at Føroyar gera munagóð átøk á veðurlagsøkinum beinanvegin, tí annars verður trupult at røkka málinum, sum er sett fyri 2030. Eingin ivi er um, at verða eingi stig tikin nú, verður fíggjarliga avleiðingin enn størri við tíðini.

# Inngangur

Veðurlagsbroytingarnar eru ein stór hóttan í okkara tíð. Alheims upphitingin stendur við, og serfrøðin hevur ein greiðan og einfaldan boðskap til heimssamfelagið, sum ljóðar: Takið ábyrgd og byrgið upp fyri veðurlagsbroytingunum skjótast til ber.

Vit vita við stórari vissu, at jørðin hitnar av mannaávum, og stór tøk skulu takast fyri at bøta um støðuna. Veðurlagsnevndin hjá ST, IPCC, staðfesti í 2018, at samlaða útlátið av vakstrarhúsgassi í heiminum skal minka niður í slaka helvt í 2030, og nettoútlátið skal vera heilt burtur í 2050, skal tað eydnast at halda upphitingini niðan fyri tvey, og helst undir hálvtannað hitastig í mun til undan ídnaðarkollveltingina. Miðalhitin á jørðini er longu hækkaður næstan eitt hitastig síðani ídnaðarkollveltingina.

Greið átøk skulu til, tí forsagnirnar um avleiðingarnar av veðurlagsbroytingum eru álvarsamar. Ísurin á suðurpólinum og norðpólinum bráðnar, heimshøvini fløða, og ávarað verður um øðrvísi lívsumstøður um allan heim. Upphitingin kann elva til matvørutrot, plantur og djórasløg fara at doyggja út, vatnflóðir á nøkrum økjum og turkur aðrastaðni. Milliónir av fólki verða noydd at flýggja undan hitabylgjum og turki. Eisini hjá okkum kunnu vit fara at merkja avleiðingarnar, t.d. fyri fiskiskap og aling.

Stríðið ímóti veðurlagsbroytingunum er ein heimsumfatandi uppgáva, og í Føroyum skulu vit eisini taka ábyrgd. Við at berjast ímóti veðurlagsbroytingum, røkja Føroyar eisini fleiri av teimum 17 heimsmálunum hjá ST fyri burðardyggari menning. Veðurlagspolitikkurin 2020-2030 er ein týðandi liður í strembanini eftir at skerja føroyska útlátið av vakstrarhúsgassi.

Tvær høvuðsorsøkir eru fyri, at Føroyar skulu hava nýggjan veðurlagspolitikk. Fyrsta orsøkin er, at verandi veðurlagspolitikkur gongur fram til 2020, og hann skal tískil endurskoðast. Eisini hava Føroyar tikið undir við Parísavtaluni[1], sum fær gildi í 2020. Við avtaluni hava Føroyar, saman við mest sum øllum heimsins londum, bundið seg til at seta sær framsøkin og veruleikakend mál fyri at skerja útlátið av vakstrarhúsgassi fram til 2030, so miðalhitin á jørðini ikki hækkar meira enn tvey hitastig, helst ikki meira enn hálvtannað, í mun til undan ídnaðarkollveltingina. Parísavtalan ásetur, at innan 2020 skulu londini boða ST frá, hvussu tey fara at skerja sítt útlát fram til 2030.

Tað skulu takast tøk, um tilmælini hjá IPCC skulu fylgjast. Vit vita, at avleiðingarnar verða ógvusligar, um vit bara lata standa til. Avleiðingarnar verða munandi størri, um hitalagið hækkar við tveimum stigum, heldur enn hálvumøðrum stigi. Men vit kunnu gera okkara part fyri at avmarka avleiðingarnar.

Hetta uppskotið til veðurlagspolitikk snýr seg um, hvussu Føroyar kunnu minka sítt útlát av vakstrarhúsgassi fram til 2030. Her skal viðmerkjast, at eftir Parísavtaluni skulu málini endurskoðast fimta hvørt ár fram til 2050, tvs. at málini, ið nú verða skotin upp, eiga at verða endurskoðað í seinasta lagi í 2024.

1 *Avtala, sum varð gjørd á veðurlagstoppfundinum í París í 2015 um at skerja útlátið av vakstrarhúsgassi.*





# 1

## STØÐAN Í DAG

# 1. Støðan í dag

*Í Føroyum gongur illa at skerja útlátið av vakstrarhúsgassi. Samlaða útlátið veksur støðugt, og Føroyar hava ongantíð brúkt so nógva olju sum nú.*

**Prosentvís broyting í útlátinum av vakstrarhúsgassi, 2005-2017**




*Strikumyndin vísir gongdina í samlaða útlátinum av vakstrarhúsgassi í Føroyum í mun til málið, ið sett varð í 2009. Útlátið er vaksið seinastu árini, og var 9 prosent hægri í 2017 enn í 2005.*

*Kelda: Umhvørvisstovan*

Føroya Løgting samtykti einmælt í 2009, at Føroyar í árunum frá 2010 til 2020 skuldu minka útlátið av vakstrarhúsgassi við í minsta lagi 20 prosentum í mun til útlátið í 2005. 10 ár seinni kann staðfestast, at hetta gongur illa. Tvørturímóti er útlátið nú umleið 9 prosent hægri enn í 2005. Tað er nú greitt, at vit røkka ikki málinum, sum varð sett í veðurlagspolitikkinum í 2009.

**Samlað útlát av vakstrarhúsgassi 1990-2017 – $CO_2$ eindir, 1.000 tons**




*Í 2017 var samlaða útlátið av vakstrarhúsgassi í Føroyum 1.040.900 tons.*

*Kelda: Umhvørvisstovan*

**Vakstrarhúsgassið í 2017 býtt á nýtslubólkar**




*Myndin til vinstru vísir býtið av útlátinum av vakstrarhúsgassi í 2017 býtt á nýtslubólkar. Fiskiskip er nógv tann størsti einstaki bólkurin. Orsøkin til, at bólkurin tyrlur og flogfør er so lítil, er, at flogførini fyri tað mesta bunkra uttanlands, og at útlátið verður talt við, har brennievnið verður keypt.*

*Kelda: Umhvørvisstovan*

Orsøkin til vøksturin í orkunýtsluni er fremst av øllum, at virksemið í samfelagnum er vaksið. Bæði innlendis ferðslan og skip hava økt sítt samlaða útlát, meðan útlátið frá upphiting og elframleiðslu er mest sum støðugt. Útlátið av vakstrarhúsgassi frá ídnaði á landi er størri enn nakrantíð. Í 2017 stavaðu umleið 91 prosent av samlaða útlátinum av vakstrarhúsgassi í Føroyum frá orku, tað vil siga brenning av olju, bensini og burturkasti. Umleið trý prosent stavaðu frá landbúnaði, serliga neyta- og seyðahaldi. Seks prosent stavaðu frá ídnaðargassi.





# 2

# KARMURIN UM VEÐURLAGSPOLITIKKIN NÆSTU 10 ÁRINI

# 2. Karmurin um veðurlagspolitikkin næstu 10 árini

Landsstýrið hevur boðað frá, at Føroyar taka undir við í Parísavtaluni. 196 lond samtyktu søguligu veðurlagsavtaluna á veðurlagstoppfundinum COP21 í París í 2015.

Avtalan varð mett at vera eitt frambrot, tí hetta var fyrstu ferð, at mest sum øll heimsins lond tóku samábyrgd og settu sær eina framsøkna ætlan fyri ein altjóða veðurlagspolitikk. Parísavtalan er ein virkisætlan, sum skal avmarka hitavøksturin til tvey stig, tó helst ikki meira enn hálvtannað stig í mun til áðrenn ídnaðarkollveltingina. Avtalan er eitt víðkað framhald av Kyoto-frumskjalinum, sum er galdandi fram til ársenda í 2019. Parísavtalan fær gildi 1. januar 2020.

Føroyar vilja taka ábyrgd í altjóða tiltøkum og sáttmálum á veðurlagsøkinum. At Parísavtalan er galdandi fyri Føroyar krevur, at føroyski veðurlagspolitikkurin verður dagførdur og endurskoðaður samsvarandi avtaluni, og at Føroyar verða nevndar fyri seg í samlaðu uppgerðini fyri kongsríkið Danmark. Parísavtalan miðar í høvuðsheitum eftir, at:

- **Miðalhitin á jørðini skal ikki hækka meira enn tvey stig í mun til áðrenn ídnaðarkollveltingina. Helst ikki meira enn hálvtannað stig. Londini fara beinanvegin undir at skerja sítt útlát av vakstrarhúsgassi.**
- **Framkomnu ídnaðarlondini skulu hjálpa menningarlondunum við íløgum í reinorku verkætlanir fyri 100 millardir dollarar um árið.**
- **Londini dagføra sína virkisætlan fimta hvørt ár. Nýggja virkisætlanin skal vera framsøknari enn tann undanfarna.**
- **Annaðhvørt ár skulu londini gera eina støðisfrágreiðing um gongdina. Frágreiðingin skal sendast ST.**
- **Øll londini brúka sama leist at máta, rokna og fráboða sítt útlát.**
- **Millum ár 2050 og 2100 skal samlaða útlátið í heiminum ikki vera størri, enn trø, plantur og havið kunnu upptaka.**



Í Parísavtaluni eru eingi ítøkilig mál sett fyri, hvussu nógv samlaða útlátið í heiminum skal minka í tonsum ella prosentum næstu 10 árini, men veðurlagsnevndin hjá ST, IPCC, mælir staðiliga til, at minkingin verður 45 prosent í 2030 í mun til 2010, og at útlátið í 2050 ikki er meira, enn trø, plantur og hav kunnu upptaka. Tað er eisini á hesum stiginum, at londini rundan um okkum seta síni mál. Tað verður roknað við, at londini taka ábyrgd eftir førimuni – common but differentiated responsibility. Avbjóðingarnar og møguleikarnir eru ymisk í teimum einstøku londunum, men tað verður roknað við, at ídnaðarlondini taka størri ábyrgd enn menningarlondini.

Við støði í hesum fara Føroyar somuleiðis at seta sær framsøkin og realistisk mál. Hetta merkir, at málini javnan skulu eftirmetast, tí hvat er realistiskt og mest skynsamt, flytir seg so hvørt, sum tøknilig, búskaparlig og onnur viðurskifti broytast.





# 3

## VEÐURLAGSMÁLINI FYRI FØROYAR FRAM TIL 2030

# 3. Veðurlagsmálini fyri Føroyar fram til 2030

Veðurlagsmálini fyri Føroyar fram til 2030 verða sett í tveimum. Annar parturin fevnir um útlátið á landi, og hin um útlátið frá skipum. Hetta, tí fyritreytirnar á landi og hjá skipum eru heilt ymiskar.

**TILMÆLI:** Føroyar minka útlátið frá virksemi á landi við í minsta lagi 45 prosentum fram til 2030 í mun til útlátið í 2010.

Føroyar fara beinanvegin at seta tiltøk í verk at tálma útlátið frá skipum og at fyrireika seg til, at útlátið á sjónum skal vera skert 50 prosent í 2050 í mun til 2008.

Grundarlagið undir settu málunum er fyrst og fremst atlitið til tilmælið frá ST um at skerja útlátið nógv og skjótt, samstundis sum málini eisini eru realistisk. Tey líkjast í stóran mun teimum, ið uppskotið til orkupolitikk frá 2018[1] byggir á.

Verður tilmælið frá IPCC fylgt neyvt, og samlaða føroyska útlátið, t.e. útlátið á sjógvi og landi, skal minka við 45 prosentum, hevði tað í veruleikanum merkt, at næstan øll oljunýtsla á landi skal vera burtur í 2030. Tað verður ikki mett realistiskt.

Møguleikarnir eru enn avmarkaðir at skerja útlátið á sjónum. Lagt verður ikki upp til at minka fiskiskapin, men møguleikarnir fyri rakstrartillagingum eiga at verða troyttir, har tað er møguligt.

Í fylgiskjali 2 verður mett um, hvussu tilmæltu átøkini í teimum ymsu bólkunum kunnu fara at minka oljunýtsluna. Mælt verður til at hava neyvt eftirlit við, um metingarnar fara at halda, so neyðugar tillagingar kunnu gerast, har tað er neyðugt.

## 3.1 Á landi

Oljunýtslan á landi var sløk 140.000 tons í 2010, sum er árið, IPCC tekur útgangsstøði í. Ein skerjing á 45 prosent svarar til, at nýtslan skal niður á umleið 75.000 tons í 2030.

Mælt verður til, at oljunýtslan til upphiting og til elframleiðslu verða minkað heilt munandi.

Umframt at minka oljunýtsluna til upphiting og til elframleiðslu, verður eisini mælt til at minka oljunýtsluna til ferðslu og ídnað.

Viðvíkjandi el- og vetnisbilum er støðan tann, at sum er, eru øll avgjøld av nýggjum bilum avtikin, og elbilar kunnu fáa lagaligan el prís. Fíggjarliga hava reinorkubilar so lagaligar treytir sum til ber at geva frá almennari síðu. Útboðið av el- og vetnisbilum økist og fer at økjast munandi, battaríini í elbilum verða alsamt betri eins og væntast kann, at prísurin fer at lækka. Eisini verður aðrastaðni í hesum uppskoti mælt til at gera brennievni dýrari til bensin- og dieselbilar. Tað hevði gjørt el- og vetnisbilar meira kappingarførar. Hetta tilsamans fer at hava við sær, at meira ferð fer at koma á søluna av el- ella vetnisbilum.

Tað er torført at meta um, hvussu orkunýtslan hjá ídnaðinum fer at hátta sær. Møguleikarnir at skifta frá oljuriknum motorum og arbeiðsmaskinum gerast alsamt betri.

Niðanfyri verða skotin upp átøk, ið skulu ávirka brúkaran at brúka minni orku yvirhøvur og at skifta olju út við varandi orkukeldur. Tað er tó torført at meta

1 *Orkupolitisk ætlan – hvussu røkka vit málunum fram til 2025 og 2030, Heilsu- og innlendismálaráðið 2018*

um, hvussu stóra ávirkan átøkini fáa á útlátið av $CO_2$. Hagtøl verða gjørd fyri orkunýtsluna hvørt ár, so til ber at fylgja gongdini. Alt eftir, hvussu gongdin verður, eiga átøkini at verða lagað hareftir. Av tí, at málini skulu røkkast eftir stuttari tíð, er sera umráðandi, at ikki verður bíðað við at seta tiltøkini í verk, og at tey verða tillagað skjótt, har tað er neyðugt.

## 3.2 Skip

Altjóða sjoferðslufelagsskapurin hjá ST, IMO, miðar eftir, at útlátið frá skipavinnuni verður skert við 50 prosentum í 2050 í mun til útlátið í 2008, ásannandi, at enn eru møguleikarnir avmarkaðir.

IMO ger reglur um útlát, trygd o.a. sum galda fyri øll skip. Men tá tað snýr seg um útlát av vakstrarhúsgassi fara ætlaðu reglurnar hjá IMO væntandi bara at fevna um ferðamannaskip, farmaskip o.l. í altjóða sigling og helst ikki um fiskiskip. Málið hjá IMO at lækka útlátið fer tó væntandi at hava eina tøkniliga menning við sær. Hesum fara fiskiskip helst eisini at fáa gagn av.

Útvið helmingurin av samlaða føroyska útlátinum av vakstrarhúsgassi stavar frá fiskiskipum. Av hesum stavar ein munandi partur frá útlendskum fiskiskipum, sum bunkra í Føroyum. Hinvegin verður bunkring hjá føroyskum skipum uttanlands ikki tald við í føroyska útlátið.

Skipaflotin er nógv tann størsti einstaki bólkurin av orkubrúkarum í Føroyum. Tí skal hann eisini virka fyri at minka útlátið, millum annað við áhaldandi at dagføra flotan og tillaga raksturin.

Hóast møguleikarnir at minka útlátið hjá skipum ikki eru eins góðir, sum teir eru á landi, merkir tað ikki, at onki kann gerast. Tað tekur tíð at menna aðrar motorar, men onnur rakstrarátøk eiga at verða kannað. Mælt verður til, at eitt serstakt arbeiði verður sett í verk til tess at kanna, hvørjir møguleikar eru innanfyri teir ymsu skipabólkarnar. Hetta verður mett víðfevnandi og at liggja uttan fyri endamálið við hesum arbeiði.

**Tilmæli, staðfestingar og framrokning av $CO_2$ útláti** – $CO_2$ eindir 1.000 tons




*Strikumyndin vísir gongdina í samlaða útlátinum í Føroyum seinastu árini, og hvussu útlátið fer at økjast, um verandi gongd heldur fram. Gráa linjan vísir málið, sum Veðurlagspolitikkurin frá 2009 setti, og gula linjan vísir málið, sum Veðurlagspolitikkurin 2020 setur.*





# 4

## TILMÆLI

# 4. Tilmæli

Við báðum høvuðsmálunum í veðurlagspolitikkinum skulu Føroyar undir eina miðvísa tilgongd at minka útlátið av vakstrarhúsgassi fram til 2030.

Málini fram til 2030 eru partur av eini størri tilgongd. Heimsins lond stremba eftir, at einki nettoútlát av vakstrarhúsgassi verður í 2050. Í Føroyum skal eisini áhaldandi stýrast eftir hesum málinum, so hvørt nýggj vitan og tøkni vinnur fram.

Niðanfyri verða átaksøki og tilmæli útgreinað.

## 4.1 Átaksøki

Tey 20 tilmælini taka støði í sjey átaksøkjum. Tey eru:

**ÁTAKSØKI:**

1. Seta fastari karmar um veðurlagspolitikkin
2. Minka oljunýtsluna til upphiting
3. Minka oljunýtsluna til ferðslu
4. Øll elframleiðsla verður úr varandi orkukeldum
5. Minka oljunýtsluna til vinnu á landi
6. Minka oljunýtsluna og útlátið av ídnaðargassi hjá skipum
7. Upplýsing, gransking og menning

## 4.2. Seta fastari karmar um veðurlagspolitikkin

***Mál:** At tað almenna áleggur sær skyldur og fremur tær* Landsstýrið og løgtingið eiga við lóggávu og leiðreglum áhaldandi at stýra eftir, at átøkini í veðurlagspolitikkinum verða útint.

Atlit skal takast til veðurlagsmálini í allari lóggávu og øllum virksemi hjá tí almenna og hjá kommunum. Veðurlagspolitikkurin frá 2009 hevur víst, at tað er trupult at røkka ásettu málunum, um tað ikki verður stýrt eftir teimum í øllum lutum. Mælt verður til at gera átøk, sum vera við til at fáa veðurlagspolitikkin í fasta legu og áleggja almennu myndugleikunum ein virknan leiklut.

### 1. Veðurlagslóg og frágreiðing

Mælt verður til at samtykkja lóg, ið ásetur, hvussu nógv útlátið av vakstrarhúsgassi skal minka og hvussu skjótt. Endamálið er at tryggja, at tiltøk veruliga verða sett í verk fyri at tálma útlátið av vakstrarhúsgassi.
Harafturat verður mælt til, at landsstýrið skal leggja frágreiðing fyri løgtingið árliga ella annaðhvørt ár. Her skal greiðast frá støðuni, hvørji átøk eru framd, og hvørjar ætlanir eru frameftir.
Hetta fer at varpa ljós á veðurlagspolitikkin, sum kann vera við til at veita størri vissu fyri, at neyðug átøk verða framd í verki.

### 2. Ráðgevandi veðurlagsbólk

Mælt verður til at seta ein veðurlagsbólk við fakfólki, hvørs uppgáva skal vera støðugt at eftirmeta veðurlagspolitikkin, og um neyðugt mæla til tillagingar.

Umhvørvisøkið broytist stútt og støðugt, og tilgongdin skal helst av somu orsøk tillagast, so átøkini verða so skynsom sum til ber.

### 3. Veðurlagspolitikk fyri almenna geiran

Tað almenna eigur at ganga undan við reinorkuskiftinum. Landsstýrið kann illa krevja av borgarum og vinnu at taka boðskapin í álvara at skerja útlátið av vakstrarhúsgassi, um tað almenna og kommunur ikki sjálvi vísa hetta í verki.

Mælt verður til at seta krøv til almennar myndugleikar um, at umhvørvisvinarligar loysnir skulu veljast í almenna geiranum, har tað ber til, millum annað tá umrøður upphiting av bygningum og keyp av bilum. Eisini verður mælt til at áleggja almennum stovnum á hvørjum ári at gera orkuroknskap og frágreiðing um gjørd og ætlað tiltøk fyri orkusparing og umlegging til reinorku.

### 4. Lata umhvørvisstuðul til menningarlond

Føroyar eiga, sum framkomið ídnaðarland, at vera við til at fíggja reinorkuskiftið í menningarlondum. Grunnurin Green Climate Fund, GCF, varð stovnaður við støði í Parísavtaluni fyri at skunda undir skiftið í menningarlondunum. Avtalað varð, at gjaldast skulu 650 milliardir krónur árliga í grunnin. Higartil hava 43 lond, teirra millum øll Norðurlond, bundið seg til at vera við.

Tað er ymiskt, hvussu nógv londini lata fyri hvønn íbúgva. Ísland letur 6,5 milliónir krónur tilsamans. Mælt verður til, at Føroyar lata umleið somu lutfalsligu upphædd, ella umleið eina millión krónur um árið.

## 4.3 Minka oljunýtsluna til upphiting

***Mál:** Í minsta lagi helvtin av upphiting av sethúsum og bygningum verður grundað á varandi orkukeldur*

Umleið 50.000 tons av olju verða árliga brúkt til at hita sethús og bygningar. Umleið 18.000 sethús og bygningar eru í Føroyum. Allarflestu verða upphitað við oljufýrum.

Í 2030 eigur í minsta lagi helvtin av sethúsum og bygningum at verða hitað við varandi orkukeldum. Skal hetta røkkast, er neyðugt at fara undir átøkini beinan vegin. Enn eru bert umleið 2.500 av teimum 18.000 húsunum hitað við hitapumpum ella fjarhita. Fyri at náa málinum skulu millum 6.000 og 7.000, ella í miðal 600 til 700 hús og bygningar um árið, skifta til varandi orku fram til 2030.

### 5. Oljufýr skulu út og reinorka inn

Tað skal framhaldandi vera krav, at allir almennir nýbygningar skulu hava reinorku hitaskipan, og í verandi almennu bygningum, skulu slíkar hitaskipanir setast upp skjótast gjørligt.

Harumframt skal vera krav, at nýggj sethús og bygningar skulu hava reinorku hitaskipan, ásannandi at lagaligasta løtan at fáa reinorku hitaskipan í sethúsum og bygningum er, tá bygt verður. Henda ætlanin eigur at verða fráboðað skjótast til ber við minst eitt árs freist, áðrenn hon verður sett í verk.

Forboð skal eisini setast fyri at skifta gomul oljufýr út við nýggj. Hetta kann gerast við longri freist enn fyri oljufýr til nýggj hús, men eigur eisini at verða fráboðað skjótast møguligt.

Sum er fáa hitapumpur og innlegging av teimum meirvirðisgjald endurrindað. Hetta verður mett at hava týdning, tá hitapumpur skulu útvegast. Fyri at stimbra útbreiðsluna verður mælt til, at frítøkan fyri meirvirðisgjald verður longd og møguliga ikki tíðaravmarkað.

Her skal leggjast aftrat, at hetta er ikki peningur, ið landskassin skal leggja út. Tað er eisini bert í avmarkaðan mun peningur, sum annars hevði komið inn í landskassan, tí møguliga hevði stórur partur av hitapumpunum tá ikki verið keyptur.

Ein annar fíggjarligur faktorur, ið tykist at vera ein forðing fyri at fleiri fáa hitapumpur, er, at íløgukostnaðurin kann tykjast tungur at lyfta hjá nógvum. Um ikki munagóð fíggingartilboð koma skjótt, sum fólk taka til sín, eiga myndugleikarnir at taka stig til beinleiðis ella óbeinleiðis at bøta um hetta.

### 6. Eggja til at bjálva

Fyri tann einstaka er tað ein góð loysn at minka orkutørvin við at bjálva, um tað loysir seg fíggjarliga.

Minkar tørvurin á elorku, minkar eisini tørvurin á at útbyggja framleiðslukervið og elnetið hjá SEV og harvið eisini íløgurnar, tí minni el skal framleiðast. Bjálving hevur tó ikki við sær, at sloppið verður heilt undan at brúka orku til upphiting. Tørvur verður undir øllum umstøðum á at hava upphiting úr varandi orkukeldum.

Fyri at eggja fólki til at bjálva hús, eigur meirvirðisgjaldið fyri tilfar og arbeiðsløn at verða endurrindað.

### 7. Styrkja vegleiðingina um orkuloysnir

Tann almenna vegleiðingin skal styrkjast. Tá íløga skal gerast í nýggja hitaskipan, ella verandi hús og hitaskipan skulu orkuendurnýggjast, er tað ein stór íløga fyri húsaeigaran. Tað er tí av stórum týdningi at finna røttu loysnina. Tað kann gerast við fáa óhefta og ókeypis vegleiðing.

Fyri at veita dygdargóða vegleiðing, mugu røttu førleikarnir til. Hesir kunnu í ávísan mun mennast innanfyri tað almenna, t.d. hjá Landsverki og/ella á Umhvørvisstovuni. Afturat ber til at brúka privatar ráðgevingarfyritøkur, har tað almenna rindar ein part av kostnaðinum.

## 4.4 Minka oljunýtsluna til ferðslu

***Mál:*** *Ferð skal setast á útbreiðsluna av el- ella vetnis-akførum*

Meira ferð kann væntast at koma á umskiftið frá bensin- og dieselakførum til el- ella vetnisakfør. Bilframleiðarar eru nú av álvara við at menna útboðið av el- og vetnisbilum, og við stuttu frástøðuni millum býir og bygdir í Føroyum kann nógv av lættaru ferðsluni á landi leggjast um til elbilar næstu árini. Veðurlagið í Føroyum er eisini væl egnað til elbilar, tí battaríini í elbilum virka best í hitalagi, har tað hvørki er ov kalt ella ov heitt.

Ferðslan stendur nú fyri umleið 10 prosentum av samlaða útlátinum. Í 2017 brúktu Føroyar umleið 33.000 tons av brennievni til bilar, lastbilar og bussar. Framvegis eru lutfalsliga fáir elbilar í Føroyum, bara 0,4 prosent av samlaðu akførunum. Í juni 2019 vóru umleið 160 el akfør skrásett í Føroyum. Í alt eru 18.612 bensinbilar og 14.843 dieselbilar skrásettir í Føroyum.

Eisini lastbilar, bussar og entrepreneurmaskinur fáast nú í alt størri mun sum el- ella vetnisrikin.

### 8. Forboð setast fyri bensin-, diesel- og hybridbilar

Forboð eigur at verða sett fyri at selja nýggjar bensin-, diesel- og hybridbilar í 2030.

Fleiri av bilaframleiðarunum hava boðað frá, at framleiðslan av bensin- og dieselbilum verður steðgað um nøkur ár. Fyri at geva fólki góða tillagingartíð, eigur longu nú at verða boðað frá, at forboðini koma í gildi í 2030.

Tað almenna og kommunur eiga at ganga á odda og keypa el- ella vetnisbilar til sítt virksemi.

### 9. Avgjaldsfrítøkan fyri elbilar skal leingjast og onnur gjøld endurskoðast

Frítøkurnar av skrásetingargjaldi, meirvirðisgjaldi og vektgjaldi eiga at verða longdar.

El- og vetnisbilar eru longu nú frítiknir fyri skrásetingargjald, meirvirðisgjald av virði upp til 350.000 krónur og fyri vektgjald. Hesi galda til ársenda 2020. Er verulig ferð ikki komin á søluna av el- og vetnisbilum til ta tíð, eiga frítøkurnar at verða longdar í avmarkað tíðarskeið.

Til ber at endurskoða tey gjøld, sum keyparar av motorakførum rinda við skráseting (vanliga nevnd skrásetingargjøld). Gjøldini eru virðisgjald og $CO_2$-avgjald. Endamálið eigur at vera, at skrásetingargjøldini vera umhvørvisvinaligari og í størri mun eggja til, at borgarar velja umhvørvisvinaligar og orkuvirknari bilar við lítlum útláti av $CO_2$ heldur enn bilar við høgum útláti av $CO_2$. Mælt verður til at hækka $CO_2$-avgjaldið og at lækka virðisgjaldið.

### 10. Felags ferðslan skal verða grundað á varandi orkukeldur

Land og kommunur eiga at leggja seg eftir, at bussar í mest møguligan mun frameftir verða riknir við varandi orkukeldum. Eisini skal møguleikin kannast at fáa el-ferjur at sigla millum oyggjarnar.

Veðurlagspolitikkurin eigur í høvuðsheitum at vera berandi í samferðsluætlanum, sum landið leggur. Tað vil siga, at felags ferðslan eigur at vera so atkomilig sum til ber, so samlaða ferðslan minkar. Eisini eiga kommunur, sum útbyggja samferðslukervið, í mest møguligan mun at leggja seg eftir, at umstøðurnar at ganga og súkkla verða so góðar sum tilber.

## 4.5 Øll elframleiðsla skal verða úr varandi orkukeldum

***Mál:*** *Øll elframleiðsla verður úr varandi orkukeldum*

Málið er, at øll elorka skal vera framleidd úr varandi orkukeldum í 2030. Sum er, verður sløk helvtin av elorkuni framleidd úr olju, og el- og hitaframleiðslan stóð fyri 12 prosentum av samlaða útlátinum í 2017.

Ein yvirskipað ætlan er løgd fyri útbygging av varandi orkukeldum til elframleiðslu[1]. Næstu tvey árini verður verandi máttur av vindorku eftir ætlan øktur við 42 MW, úr 18 MW upp í 60 MW. Eftir tað verður mátturin av vindorkuframleiðslu framhaldandi øktur saman við pumpuverkætlanum og sólorku. Møguliga eisini við sjóvarfalsorku, um tað fer at vísa seg fíggjarliga burðardygt.

Í stóran mun gera somu viðurskifti seg galdandi í orkupolitikki og veðurlagspolitikki. Mælt verður tí eisini til, at hesir politikkir verða samansjóðaðir.

---

1 *Orkupolitisk ætlan – hvussu vit røkka málunum fram til 2025 og 2030 (Heilsu- og Innlendismálaráðið 2018)*

### 11. Elframleiðslukervið skal útbyggjast

Sambært omanfyri nevndu ætlan fara íløgur at verða gjørdar fyri umleið 2 mia. kr. í framleiðsluverk og goymslur umframt umleið 1,3 mia. kr. í netútbyggingar fram til 2030.

Tað eru serliga vindorka, sólorka og orkugoymslur sum pumpuskipanir og battarískipanir, ið skulu gera elframleiðsluna 100 prosent grøna í 2030.

Myndugleikarnir eiga at virka fyri, at útbyggingarnar verða framdar so skynsamt sum til ber, m.a. við atliti til kostnað, umhvørvi, og at tær verða gjørdar til rætta tíð.

### 12. Avlopsorka skal gagnnýtast

Avlopsorka frá oljuriknu elverkunum, brennistøðunum, biogassverkum og øðrum eigur eisini at gagnnýtast best møguliga. Væntast kann, at avlopsorka frá elverkum og helst eisini frá brennistøðunum fer at minka munandi, men so leingi hon er har, eigur hon at verða gagnnýtt.

### 13. Betri gagnnýtsla av burturkasti

Nøgdin av burturkasti eru vaksandi. Átøk eiga verða gjørd fyri at avmarka hetta og í øðrum lagi fyri at gagnnýta tað betri. Til tess krevst, at møguleikarnir at skilja burturkast eisini verða betri.

## 4.6 Minka oljunýtsluna til vinnu á landi

***Mál:** At minka oljunýtsluna til vinnu á landi*

Ídnaðurin átti átta prosent av samlaða útlátinum í 2017. Tað fevnir um útlát, sum stavar frá brenning av olju, serliga fiskiídnaðarvirkjum, flakavirkjum og byggivirkjum.

Sum nevnt omanfyri verða alsamt betri møguleikar at skifta oljuriknu motorarnar og arbeiðsmaskinurnar út við vetnis- ella elmotorar.

### 14. Orkueffektivisering

Skulu vit hava búskaparvøkstur, má roknast við, at vit eisini mugu brúka orkuna meira skynsamt, t.v.s., at orkunýtslan fyri hvørja framleidda eind skal lækkast. Ein skipað tilgongd eigur at verða sett í verk at kanna, hvørjir realistiskir møguleikar eru fyri orkueffektivisering. Aðrastaðni í hesum uppskoti verður mælt til at styrkja almennu orkuvegleiðingina. Ein uppgáva hjá hesi kann verða at hjálpa vinnuni við orkueffektivisering.

## 4.7 Minka oljunýtsluna hjá skipum og flogførum

***Mál:** Oljunýtslan hjá skipum og bensinnýtslan hjá flogførum skulu minkast*

Møguleikarnir at skerja útlátið frá skipum eru, sum nevnt, meira avmarkaðir enn fyri útlátið á landi. Tøkniliga eru enn bara avmarkað alternativ til oljuriknu motorarnar, tó at gransking og menning innan økið bendir á, at fleiri fara at koma sum frá líður.

Fiskiskip standa fyri einum trivaligum parti av samlaða útlátinum – í 2017 var parturin umleið 48 prosent av samlaða útlátinum. 42 prosent frá oljunýtslu og seks prosent frá nýtslu av kølievnum (F-gassi, sum verða umrødd aðrastaðni í hesum uppskoti). Harav áttu útlendsk skip, sum bunkra í Føroyum, ein stóran part.

Parísavtalan áleggur ikki beinleiðis londunum at minka útlátið í millumtjóða sigling og flúgving. Semja er ikki um, hvussu hetta útlátið skal gerast upp, og hvørt skyldurnar skulu áleggjast landinum, har brennievnið er keypt ella landinum, har skipið ella flogfarið er heimahoyrandi. IMO, hevur sett sum mál, at í 2050 er útlátið frá sjóvinnuni skert við 50 prosentum samanborið við útlátið í 2008. Síðani er málið stigvíst at steðga útlátinum av vakstrarhúsgassi fram móti endanum av hesi øldini. Hetta verður ætlandi gjørt við at brúka marknaðarmekanismur til at menna brennievni við minni útláti (low-carbon fuels) og brennievni heilt uttan útlát av vakstrarhúsgassi (zero-carbon fuels).

IMO hevur gjørt av, at ein ítøkilig ætlan fyri at minka útlátið frá sjóvinnu skal vera samtykt í 2023.

Mælt verður til, at Føroyar skulu fylgja teimum samtyktum, sum IMO ger á hesum øki.

Úti í heimi veksur útlátið frá flogvinnuni í stórum, men í Føroyum stendur flogferðslan fyri einum heilt lítlum parti av samlaða útlátinum, bara 0,1 prosenti. Orsøkin til tað er, at flogførini keypa mest sum alt brennievnið uttanlands. Tað hevur tí bara avmarkaða ávirkan á nýtsluna at leggja avgjald á brennievni til flogfør. Føroyska flogvinnan eigur kortini sjálvsagt eisini at virka fyri at minka sítt útlát og fylgja altjóða krøvum á hesum øki.

### 15. Betri fíggingarmøguleikar at byggja ella tillaga skip

Mælt verður til at stimbra áhaldandi dagføring av skipaflotanum, eins og at stimbra tillaging av rakstrinum. Myndugleikarnir eiga at gera karmar fyri øðrvísi fíggingarhættum at byggja nýggj skip fyri og til at gera íløgur í orkusparandi skipanir á verandi skipum. Strembast skal eftir at skifta flotan út so líðandi, tí nýggj skip við nýggjastu motortøknini hava væl minni orkunýtslu enn eldru motorarnir.

### 16. Leggja umhvørvisgjald á F-gass

Nýtslan av sonevndum F-gassi, serliga HFC gassi, er økt munandi seinnu árini. F-gass eru sera sterk vakstrarhúsgass, sum hava fleiri túsund ferðir so stórt upphitingarevni sum $CO_2$. Hesi verða serliga nýtt í køliskipanum umborð á skipum, men eisini í hitapumpum o.ø.

Í 2017 stavaðu seks prosent av samlaða útlátinum av vakstrarhúsgassi í $CO_2$ eindum frá F-gassi.

Grannalondini hava ásett eitt høgt umhvørvisgjald á F-gass, millum umleið 500 og 2.000 kr./kg. Men einki slíkt avgjald er í Føroyum. Fyri at eggja til at skifta til onnur kølievni, sum ikki eru sterk vakstrarhúsgass, verður mælt til at áseta umhvørvisgjald á F-gass. Hetta hevði eisini verið í samsvari við Kigali avtaluna[2], sum Føroyar nýliga hava tikið undir við. Sambært avtaluni hava ídnaðarlondini bundið seg til at skerja nýtsluna av F-gassi við 85 prosentum í 2036.

Nøkur føroysk fiskiskip hava skift til umhvørvisvinarligari kølievni.

## 4.8 Upplýsing og gransking

***Mál:** At stimbra umhvørvisvinaliga tilvitið og menna loysnir til okkara tørv*

Føroyar eiga sum samfelag áhaldandi at arbeiða fyri at minka um útlátið av vakstrarhúsgassi fyri at tálma veðurlagsbroytingunum og at upplýsa og stuðla undir almennum orðaskifti, so veðurlagspolitikkurin alla tíðina er á politiska breddanum.

Í hesum partinum verður mælt til tiltøk, sum kunnu stimbra umhvørvisvinaliga tilvitið og almenna orðaskiftið um veðurlagsbroytingar.

### 17. Upplýsing

Mælt verður til áhaldandi upplýsingarátøk, sum gera okkum varug við veðurlagsbroytingarnar bæði úti í heimi og her heima, so vit bera okkum skynsamt at í gerandisdegnum.

Eisini í undirvísingarhøpi eigur dentur at verða lagdur á veðurlagsbroytingarnar.

### 18. Fyrireiking til avleiðingar av veðurlagsbroytingum

Mælt verður til, at aðalráð og stovnar gera seg tilvitað um avleiðingarnar av veðurlagsbroytingum, so vit fáa lagt upp fyri hesum í so góðari tíð sum gjørligt.

Granskarar eru á einum máli um, at veðurlagsbroytingarnar fara at merkjast, sjálvt um átøk verða gjørd fyri at minka útlátið. Tað skulu Føroyar eisini fyrireika seg til. Tað er ilt at meta um, hvørjar broytingarnar verða í Føroyum og hvussu ógvusligar. Men veðurlagsbroytingar kunnu ávirka bygningar, vegakervið, havnaløg, lívfrøðiliga margfeldið, fiskiskap, aling, orkuframleiðslu og annað.

### 19. Gransking og menning av loysnum

Viðurskiftini í Føroyum eru í fleiri førum serlig, um hugsað verður um veðurlag, vinnuviðurskifti, samfelagsstødd o.a. Skipað eigur tí at verða fyri, at loysnir, ið hóska til okkara viðurskifti, verða mentar. Hetta kann t.d. verða skipað millum vinnu, orkuveitarar og útbúgvingarstovnar, so átøkini taka støði í serligum tørvi og vitan um viðurskiftini.

---

2 *Altjóða avtala um at minka nýtsluna av HFC gassi.*



## 4.9 Avgjald á olju og bensin

Afturat nevndu átøkunum, ið virka fyri at minka oljunýtsluna, verður mælt til at seta eitt $CO_2$-avgjald á allar oljuúrdráttir, ið verða nýttir til orkuendamál. Tað er gjald fyri dálking, fyri at minka nýtsluna og at skunda undir at fáa brúkararnar at skifta til reinorku, har tað ber til.

Oljunýtslan er orsøkin til meira enn 90 prosent av samlaða føroyska $CO_2$ útlátinum.

### 20. $CO_2$ avgjald

Eitt $CO_2$ avgjald, sum verður lagt á hvønn seldan litur, er einfalt at umsita, antin gjaldið er tað sama fyri øll endamál, ella ymiskt gjald skal verða fyri ymsar bólkar. Vísast kann til fakligu frágreiðingina, sum Skattanevndin legði fram í desember 2017[3].
Endamálið við einum $CO_2$-avgjaldi er bæði at staðfesta grundregluna um, at tað skal kosta at dálka, og at tað kann vera við til at ávirka nýtslumynstrið. Skal endamálið røkkast, er neyðugt, at gjaldið er somikið høgt, at brúkarin velur reinorku loysnir, heldur enn at rinda gjaldið. Fyri at ávirka atferðina krevst sjálvsagt eisini, at brúkararnir hava veruligan møguleika at skifta til aðra orkukeldu, og/ella at minka nýtsluna. Har endamálið bæði er at ávirka nýtslumynstrið og seta gjald á fyri at dálka, eigur gjaldið at vera hægri enn har, tað bara er fyri at dálka.
Eitt slíkt gjald hevur sjálvsagt við sær fíggjarligar avleiðingar fyri tey, ið skulu rinda. Arbeiðsbólkurin hevur í hesum føri einans tikið atlit at sjálvum umhvørvinum og útlátinum av veðurlagsgassi, og ikki at samlaða skattatrýstinum í Føroyum. Fíggjarligu avleiðingarnar av einum slíkum gjaldi eiga sjálvsagt at vera væl lýstar, áðrenn tað verður sett í verk. Tað inniber millum annað at kanna, um tað samstundis er neyðugt at lækka skattatrýstið ella onnur avgjøld.

3 *Léttari, rættari og grønari – uppskot til broytingar í skattaskipanini. Landsstýrisins skattanevnd 2017.*




5
FYLGISKJØL

# Fylgiskjal 1

## Nøkur fíggjarviðurskifti

Avgjøld og frítøka fyri avgjøld ávirka landskassan. Niðanfyri er ein stutt lýsing av, hvussu átøkini kunnu ávirka landskassan og ein ábending um, hvørjar upphæddir talan møguliga kann verða um. Ítøkiligu avleiðingarnar eru tengdar at, hvussu átøkini verða sett í verk, t.d. hvussu stórt $CO_2$ avgjald verður lagt á oljuúrdráttir. Her verður givin ein ábending um avleiðingarnar av teimum átøkum, ið mælt verður til at seta í verk.

Í uppskotinum eru tilmæli um at áleggja avgjøld á brennievni og F-gass, meðan el- og vetnisbilar og reinorku hitaskipanir verða frítikin fyri avgjøld.

Aðrar fíggjarligar avleiðingar, enn tær, ið verða nevndar niðanfyri, verða eisini, men eru ikki viðgjørdar her, eitt nú inntøkuskattur, ið stavar frá orkuumleggingini. Fyri at geva eina meira fullfíggjaða búskaparliga mynd av orkuskiftinum, kann verða mett um tørvin á at hava eina meira útgreinaða lýsing, innan avgerðir verða tiknar. Slík lýsing verður mett at liggja uttan fyri endamálið við hesum uppskoti.

### Inntøkur til landskassan frá gjøldum

Inntøkurnar, ið landskassin fær frá $CO_2$ gjøldum, eiga at verða brúktar til heilt- ella partvís at fíggja stuðulsskipanir til orkuskiftið. Hinvegin eiga hesi gjøld ikki at vera ein fyritreyt fyri at seta stuðulskipanir í verk, sum verða hildnar neyðugar fyri at fremja skiftið. Ein grundgeving fyri at leggja $CO_2$ avgjøld á olju, bensin o.a., ið útletur $CO_2$, er at heinta inn tann kostnað, sum hetta veruliga hevur fyri samfelagið. Tað er sjálvandi torført at seta eitt neyvt krónutal á tað, men gjørdar eru ymsar útrokningar av hesum. Úrslitini eru ógvuliga ymisk, t.d. kemur eitt úrslit til góðar 200 kr. fyri hvørt tonsið av $CO_2$[1], eitt annað úrslit kemur til umleið 1.500 kr.[2]

Hetta vísir, at tað er torført at finna eina "rætta" upphædd fyri kostnaðin. Í verki verða tað tí helst ymisk atlit, ið verða løgd til grund fyri avgjøldini – eitt nú hvussu avgjaldsstøðan samlað sæð er, hvussu nógv skal til fyri at fáa fólk at broyta atferð, hvussu nógv av orkuumlegging ynskist fíggjað við mótsvarandi gjøldum osv.

Verður t.d. roknað við eini samlaðari oljunýtslu á 250 mió. litrar, sum er á leið árliga nýtslan í Føroyum, og $CO_2$ avgjaldið er 1 kr. fyri liturin, verður árliga inntøkan 250 mió. kr., men minkandi so hvørt oljunýtslan minkar.

Hvørt eitt gjald á 1 kr. er høgt ella lágt, veldst m.a. um, hvørja ávirkan tað hevur á nýtsluatferðina.

Inntøkur frá ymiskum verandi avgjøldum á brennievni fara eisini líðandi at minka, sum nýtslan av brennievni minkar. Í 2016 vóru inntøkurnar frá punktgjøldum og innflutningsgjøldum á brennievni 133 mió.kr.[3] Harafturat kemur meirvirðisgjald.

1 *https://ing.dk/artikel/oecd-co2-udledning-koster-alt-lidt-187072*

2 *https://news.stanford.edu/2015/01/12/emissions-social-costs-011215/*

3 *Lættari, rættari og grønari – uppskot til broytingar í skattaskipanini, síða 27. Frágreiðing frá landsstýrisins skattanevnd, 2017.*

Landskassin fer at fáa øktar inntøkur frá øktari elsølu. Økist elnýtslan við 300 GW á 1,50 kr. í miðal, økist inntøkan frá meirvirðisgjaldi við 90 mió. kr. Eisini hetta verður líðandi.

### Kostnaður fyri afturbering av meirvirðsigjaldi til hitapumpur

Av teimum umleið 18.000 sethúsunum og bygningunum hava 2.500 fingið antin hitapumpu ella fjarhita. Um tey eftirverandi 16.000 húsini og bygningarnir sleppa undan at gjalda meirvirðisgjald á t.d. 25.000 kr. í miðal, svarar tað til 400 mió. kr. Ella umleið 20 mió. kr. um árið yvir 20 ár, sum tað møguliga fer at taka at skifta allar oljufýringar.

Afturat teimum 16.000 verandi húsunum, ið enn ikki hava fingið reinorku hitaskipan, koma nýggj hús.

### Kostnaður fyri afturbering av meirvirðisgjaldi til bjálving

Kostnaðurin at bjálva og skifta vindeygu er vituliga sera ymiskur frá húsi til hús. Eisini eru nógv hús í dag væl bjálvað, so talan er um ein part av bygningum, ið eiga at verða bjálvaðir.
Um t.d. helvtin av øllum húsum og bygningum verða bjálvað og vindeygu skift yvir 15 ár, svarar tað til 600 hús um árið. Verður kostnaðurin settur til 300.000 kr. við meirvirðisgjaldi, svarar meirvirðisgjaldið til 36 mió. kr. um árið.

### Kostnaður fyri frítøku av avgjøldum á el- og vetnisbilar

Umleið 30.000 bilar eru í Føroyum. Um miðaltalið fyri skrásetingargjald og meirvirðisgjald á hvønn bil verður sett til 100.000 kr., svarar tað til 3 mia. kr., ella 250 mió. kr. um árið yvir 12 ár.

Bilarnir kunnu væntast at verða bíligari, sum frá líður, og verður tørvurin á avgjaldsfrítøku tá minni og kanska ongin.

# Fylgiskjal 2

## Ávirkan av átøkum

**Metingar av, hvørja ávirkan átøk kunnu fáa á útlátið av vakstrarhúsgassi**

Niðanfyri eru dømi um at minka útlátið av vakstrarhúsgassi í ymisku útlátsbólkunum, og hvussu tað ávirkar heildarútlátið í 2030. Víst eru trý dømi um framskrivingar: varlig, miðal og bjartskygd. Miðaldømið er, at Føroyar skerja útlátið á landi við 45 prosentum í mun til 2010, samsvarandi tilmælinum hjá IPCC, og at útlátið á sjónum verður skert við 14 prosentum.

| Minking í 2030 | Varlig | Miðal | Bjartskygd |
|---|---|---|---|
| Húsarhald | 30% | 40% | 55% |
| Handlar og skrivstovur | 30% | 40% | 55% |
| Akfør | 10% | 15% | 25% |
| Leitiboring | 100% | 100% | 100% |
| El- og hitaframleiðsla | 75% | 85% | 100% |
| Ídnaður | 5% | 10% | 20% |
| Landbúnaður | 0% | 0% | 0% |
| F-gass | 50% | 60% | 90% |
| Flogfør og tyrlur | 0% | 0% | 0% |
| Fiskiskip | 5% | 10% | 25% |
| Onnur skip | 10% | 20% | 25% |
| | | | |
| Á landi í mun til 2010 | 38% | 45% | 57% |
| Skip og flogfør í mun til 2008 | 8% | 14% | 28% |
| Samlað í mun til 2017 | 44% | 49% | 59% |
| Samlað í mun til 2008 og 2010 | 27% | 34% | 47% |

**Møgulig minking fyri skip og flogfør í 2030 í mun til 2008** – Í 1.000 tons av $CO_2$ eindum




**Møgulig minking á landi 2030 í mun til 2010** – Í 1.000 tons av $CO_2$ eindum



**Møgulig samlað minking av útláti** – Í 1.000 tons av $CO_2$ eindum í 2030



www.himr.fo

ISBN 978-99918-3-612-6